Bilar

Nr. 64 • hósdagur • 30. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo



*Hetta er bilurin sum konseptbilurin er gjørdur eftir, Lamborghini Miura, sum fyrstu ferð kom á marknaðin í 1966, og var gjørdur fram til 1973. Motorurin var ein 3,9 litur V12*

Lamborghini Miura:

# Konseptbilur við designi frá 60-unum



*Lamborghini Miura Konceptet er gjørdur eftir Lamborghini Miura frá 1966. Teir hava nógv til felags*




*Aftan líkjast teir heilt nógv, sjálvt persiennirnar á bakrútinum eru komnar við*



*Framman við lyktum sum liggja oman á skermunum. Á tí gamla reistu lyktirnar seg upp, tá tær vórðu tendraðar*

**Tað sær nú út til at kendi sportbilurin frá 60-unum, Lamborghini Miura, fer at koma aftur til lívs í einum nútímans sportbili við designi sum líkst heilt nógv tí gamla, sum er vorðin eitt samlaraobjekt**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Seinastu árini eru nógvir av bilunum, ið eru vorðnir klassikarar, vaktir aftur til lívs í nýggjum hami sum vit hava sæð tað við t.d. Mini, VW New Beetle, og Ford Mustang. Talan er um nútímans bilar við designi, sum líkst teimum gomlu klassikarunum bæði uttan og innan.

Ein av hesum er konseptbilurin Lamborghini Miura Konseptet. Hesin er ein einfalt retro-inspireraður konseptbilur av einum av mest kendu og virdu sportbilunum Lamborghini Miura, sum fyrstu ferð kom á marknaðin fyri 40 árum síðan, í 1966, og var gjørdur fram til 1973. Motorurin var ein 3,9 litur V12.

Hesin nýggi Miura konseptbilurin er teknaður av kenda italska bildesignaranum Walter de Silva, sum er designstjóri hjá Audi-group undir VW-konsernini, har hann teknar bilar sum Audi, Seat og Lamborghini.

Lamborghini Miura Koncept verður sýndur fram á North American International Auto Show í Detroit.

· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

Sp/f Plátuverkstaðið
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo




**ELLISAKFAR TIL SØLU**
Volvo 144. 4 hurðar (grønur). Bilurin er skrásettur fyrstu ferð í 1971. Hevur bert havt tveir eigarar. Áhugaði eru vælkomin at venda sær til.
**Tel. 213727**